Januar

LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI

# 20 av teimum størru feløgunum – ÍLØGUR & SKULD

**"Fyri at meta um framtíðina, mást tú kenna fortíðina"**

# Innihaldsyvirlit

Um frágreiðingina: 3

Endamál 3

Útvald roknskapartøl fyri 2013 – 2017 3

Fíggjarfeløg 3

Altjóða feløg 3

Avmarkingar og frávik 3

Tey útvaldu lyklatølini 4 - 5

Íløgur 6 - 7

Samlaðar íløgur 8

Altjóða samanbering 9

Skuld 10 - 11

Samlað skuld 12

Samanbering 13

Fyrivarni 13

# Um frágreiðingina

## *Endamál*

Endamálið við gjøgnumgongdini er at lýsa ta fíggjarligu gongdina, gongd og kós, sum tey størstu føroysku feløgini hava havt í tíðarskeiðnum 2013 - 2017.

Hetta verður gjørt við at hyggja at útvaldum lyklatølum og at samanhalda hesi við undanfarin ár, og í ávísum førum, eisini við gongdina í útlandinum.

## *Útvald roknskapartøl fyri 2013 – 2017*

Greiningin er gjørd við støði í almennu ársfrásøgnunum fyri 2013 – 2017. Tey útvaldu feløgini upplýsa umsetningin í ársfrásøgnini hjá felagnum, og ið fleiri førum er talan um ein samtaksroknskap.

Í frágreiðingini eru 20 feløg vald út, sum hava størsta umsetning í tíðarskeiðnum 2013 – 2017.

Greiningin fevnir sostatt ikki um feløg, ið ikki upplýsa umsetningin.

## *Fíggjarfeløg*

Fíggjarfeløg og peningastovnar eru ikki við í greiningini.

## *Altjóða feløg*

Gjøgnumgongdin inniheldur eina samanbering við lyklatøl hjá útlendskum feløgum. Talan er um Danmark (C25), Svøríki (OMX S30), Noreg (OBX 25), Týskland (DAX 30), og Ongland (FTSE 100).

Hetta er gjørt fyri at fáa betri samanberingartøl og samanbera við gongdina fyri tey føroysku feløgini. Tað skal viðmerkjast í hesum sambandinum, at Bakkafrost er eisini partur av OBX 25 í Noregi.

Lyklatølini fyri útlendsku feløgini stava frá frá Price Waterhouse Coopers, Danmark, ið hevur tilfarið frá S&P Capital IQ.

### Avmarkingar og frávik

Fyrsta roknskaparár hjá P/F Pelagos var fyri tíðarskeiðið 27/1 – 31/12-2014 og er sostatt ikki fyri eitt heilt ár. Felagið er sostatt ikki við í tølunum fyri 2013.

Allar fyritøkurnar, ið eru við í greiningini, hava álmanakkaárið sum roknskaparár.

Roknskaparhátturin hjá teimum ymisku feløgunum kann verða ymiskur, eins og tað eisini eru munir millum virksemisøkir, sum viðføra, at ein beinleiðis samanbering ikki er gjørlig. Tað eru ikki gjørdar tillagingar fyri serlig virksemis- ella vinnugreinaviðurskifti.

Gjøgnumgongdin er gjørd við útgangsstøði í umsetningi. Tølini eru fingin til vega frá Vinnuvitan.Biz og eru alment atkomilig.

# Tey útvaldu lyklatølini

Hetta er triðja frágreiðingin í eini røð. Fyrsta frágreiðingin, í almannakunngjørd 2. november 2018, viðgjørdi umsetning, ímeðan seinna frágreiðingin, almannakunngjørd 14. november 2018, viðgjørdi rakstraríkast. Eftir hesa frágreiðingina, sum umrøður íløgur og skuld, er ætlanin at koma við øðrum frágreiðingum, sum fara at viðgera onnur útvald lyklatøl. Ætlanin er, at tá ið allar frágreiðingarnar eru almannakunngjørdar, eru hesi lyklatøl viðgjørd:

- Umsetningur
- Vinningur
- Íløgur
- Skuld
- Starvsfólk
- Eginogn

Røðin fer at enda við einari samlaðari frágreiðing, sum tekur samanum.

Ætlanin er síðani, árliga at dagføra frágreiðingarnar soleiðis, at frágreiðingarnar kunnu lýsa fíggjarligu gongdina og kósina hjá teimum størstu føroysku feløgunum.

Tey feløgini, ið eru við í greiningini, eru nevnd á næstu síðu.

## Íløgur

9 av teimum 20 feløgunum øktu íløgurnar í 2017. Í mun til árið frammanundan. Í 2016 øktu 11 fyritøkur íløgurnar, sum talvan niðanfyri vísir. 11 av teimum 20 feløgunum høvdu lægri íløgur í 2017 enn í 2016.




(fig. 1.1: Fyrsta roknskaparár hjá Pelagos varð í 2014, og tí inngongur felagið ikki í 2013 ella 2014 í talvuni omanfyri. P/F Tjaldur gjørdi ikki konsernroknskap í 2012, og er tí heldur ikki við í 2013.

| Størsti vøkstur í íløgum 2017 | Vøkstur |
|---|---|
| **PELAGOS** | 1.087,3% |
| **SMYRIL LINE** | 505,3% |
| **FRAMHERJI** | 417,4% |

Pelagos hevði størstu íløguøkingina í 2017. Felagið økti íløgurnar við 1.087,3% í mun til 2016. Samlað er talan um eina íløgulækking fyri øll 20 feløgini í 2017 uppá 14,0%. Í 2016 var lækkingin 27,0% í mun til íløgurnar í 2015.

Samlaðu íløgurnar hjá hesum 20 feløgunum lækkaðu í 2013 og 2014 við ávíkavist 11,0% og 11,6%. Í 2015 var ein samlað øking uppá 47,2% og í 2016 uppá 26,9%. Í 2017 lækkaðu íløgurnar aftur við 14,0%.

Niðanfyri standandi strikumynd vísir lutvísu broytingarnar í íløgunum hesi árini.



## Samlaðar íløgur

Samlaðu árligu íløgurnar hjá hesum 20 feløgunum í árunum 2013 – 2017 síggjast í stabbamyndini niðanfyri. Í 2016 vóru íløgurnar hægstar, tá tær vóru knappar 2,0 mia.kr.




| Gongdin í íløgum, samlað | 2016 | 2017 |
|---|---|---|
| **Íløgur (mia.)** | 2,0 | 1,7 |
| **Samlaður vøkstur** | 26,9% | -14,0% |

## Altjóða samanbering

Niðanfyri er gongdin í samlaðu íløgunum hjá teimum føroysku feløgunum samanhildin við gongdina í samlaðu íløgunum hjá 20 teimum størstu feløgunum uttanlands. Fyri at lætta um samanberingina eru tølini indekserað, har samlaðu íløgurnar í hvørjum landi sær í 2013 eru settar til 100.

Av talvuni sæst, at føroysku feløgini hava havt hægst indeks fyri íløgur í 2016 og 2017. Í 2016 høvdu tey 20 feløgini í Føroyum eitt indeks uppá 165 og í 2017 uppá 142. Danmark, Noreg, Svøríki, Týskland og Ongland høvdu indeks, sum lá millum 95 - 147 í 2016 og 89 - 136 í 2017.



## Skuld

*Skuldin er gjørd upp til nettoskuld, tað vil siga lang- og stuttfreistað skuld, frádrigið tøkan pening.*

11 út av teimum 20 feløgunum øktu nettoskuldina í 2017, meðan tað bert vóru 6 feløg, í øktu nettoskuldina í 2016. Tað er vert at leggja til merkis, at meira enn helmingurin av feløgunum hava økt um nettoskuldina í árunum 2013 – 2017, tó undantikið 2016, tá samlaðu íløgurnar annars vóru størstar.




(fig. 1.1: Fyrsta roknskaparár hjá Pelagos varð í 2014, og tí inngongur felagið ikki í 2013 ella 2014 í talvuni omanfyri. P/F Tjaldur gjørdi ikki konsernroknskap í 2012, og er tí ikki við í 2013.

| Størsti vøkstur í skuld 2017 | Vøkstur |
|---|---|
| **FAROE SHIP** | 106,1% |
| **TJALDUR** | 100,0% |
| **MAGN** | 44,5% |

Faroe Ship hevði størstu økingina í skuldini í 2017. Økingin í 2017 hjá felagnum var uppá 106,1%. Samlað fyri øll 20 feløgini er talan tó um eina lækking uppá 0,5%.

Samlaða nettoskuldin øktist við 4,5% í 2013 og lækkaði í 2014 við 5,2%. Í 2015 hækkaði samlaða nettoskuldin við 8,4%. Í 2016 øktist nettoskuldin við 3,6%. Í 2017 lækkaði nettoskuldin við 0,5%.



## Samlað skuld

Samlaða skuldin er í tíðarskeiðnum 2013 – 2017 hækkað úr 4,4 mia.kr. til 4,6 mia.kr.




Skuldin hjá teimum størru feløgunum var í 2017 uppá 4,6 mia.kr. (2016: 4,7), og svarar hetta til eina lækking uppá 0,5%. Í 2016 øktist nettoskuldin við 3,6%.

| | 2016 | 2017 |
|---|---|---|
| **Skuld (mia.)** | 4,7 | 4,6 |
| **Samlaður vøkstur** | 3,6% | -0,5% |

**Samanbering**

Niðanfyri eru grafur og stabbar, sum vísa samlaðu íløgurnar og samlaðu nettoskuldina. Virðini á vinstru síðu, sum eru í talstrekkinum kr. 3.800.000 – kr. 4.800.000 vísa samlaðu nettuskuldina. Virðini á høgru síðu, sum eru í talstrekkinum kr. 0 – kr. 2.500.000, vísa samlaðu íløgurnar.




# Fyrivarni

Greiningin er gjørd sum ein almenn frágreiðing um viðurskifti, ið kunnu hava áhugað, og ikki sum yrkisráðgeving. Tú eigur ikki at handla út frá teimum upplýsingum, sum eru í greiningini, uttan aðra ráðgeving. Vit lata onga váttan, hvørki beinleiðis ella óbeinleiðis, hvat viðvíkur rættleikanum í greiningini.